Tjóðskjalasavnið

# Avhending av privatum kt-skjalasøvnum

### Tað er uppgávan hjá Tjóðskjalasavninum at taka ímóti og varðveita skjalasøvn frá privatum persónum, virkjum, felagsskapum og stovnum.

Tjóðskjalasavnið savnar, tekur ímóti og tryggjar eisini privat kt-skjalasøvn, sum verða hildin at hava stóran granskingarligan ella mentanarligan týdning. Privat skjalasøvn, sum ikki eru avhend Tjóðskjalasavninum, eigur Tjóðskjalasavnið at skráseta.

Skrásetingin hevur við sær, at eigarin fær skyldu at boða Tjóðsskjalasavninum frá, um eigaraviðurskiftini verða broytt, ella um kt-skjalasavnið verður flutt. Um skrásett kt-skjalasøvn verða flutt av landinum, hevur eigarin skyldu at geva Tjóðskjalasavninum høvi at taka avrit av kt-skjølinum, áðrenn tey verða útflutt.

Avhending av privatum kt-skjalasøvnum er sjálvboðin. Avhending til Tjóðskjalasavnið fer fram sambært avtalu. Í avtaluni  verða m.a. ásetingar um, hvat skal avhendast, hvørjar treytir skulu galda fyri atgongd o.s.fr. Áhugaverd skjalasøvn kunnu til dømis vera veiðitøl frá ymiskum reiðaríum og nevndarfundarfrágreiðingar hjá ymiskum felagsskapum osv.

## Umsókn til Tjóðskjalasavnið viðv. avhendan av ella spurningar um handfaring av privatum kt-skjalasøvnum.

Um so er, at tú hevur talgilt søguligt tilfar, sum tú heldur er vert at varðveita, ella tú hevur aðrar spurningar viðv. kt-skjalasavnsgoymslu, kanst tú venda tær til Tjóðskjalasavnið á t-post skjalasavn@skjalasavn.fo ella ringja á tlf. 340 540.

Ein tíð kann ganga frá tí at vit taka ímóti fyrispurningi tínum til vit svara ella á annan hátt fylgja upp við fleiri spurningum. Vit stremba eftir at viðgera  fyrispurningin  so nágreiniliga sum møguligt, áðrenn vit venda aftur til tín. Fyri at vit kunnu gera tað, skalt tú skriva so stutt sum gjørligt um niðanfyristandi:

- Hví vendur tú tær til Tjóðskjalasavnið?

  Skriva til dømis um tú metir, at tú hevur søguligt tilfar, sum tú ætlar at avhenda til Tjóðskjalasavnið, og um tú ynskir at fáa ráð og vegleiðing um tínar talgildu dátur, ella hvussu hesi kunnu varðveitast fyri eftirtíðina, eisini soleiðis at almenningurin kann síggja tey yvir ein kaga á alnetinum í framtíðini. Eisini um 100 ár.

- Hvat snýr tilfarið seg um?

  Er hettar tilfar, sum tú sjálv/ur hevur samla saman? Vendur tú tær til okkum vegna eitt virki, ein stovn, felagsskap, skúla ella annað?

- Hvar er tilfarið gjørt?

Lá virkið í Fuglafirði ella í Runavík? Eru hettar fundarfrágreiðingar frá nevndarlimi í einum landsfelagsskapi ella einum bygdafelag?

- Hvat tíðarskeið dragar tilfarið seg um?

- Ger eina stutta lýsing av tilfarinum?

Er hettar talgildar dagbøkur, myndir, journalmál, samskifti/brøv? ella annað?

- Er tilfarið ein samanseting av talgildum dátum og pappíri?

Eru tað filmir, fotomyndir ella ljóðupptøkur. Eru partar av tilfarinum tekstfílur og dátagrunnar. Finst tilfarið í einum gomlum harðdiski, fløgu ella á disklum?